Bridge 15. partur: Tak ikki trumf...

Vit hava fyrr skrivað um, hvussu týdningarmikið tað er at taka trumf. Tað er tó í hesum máli, sum í teimum allar flestu øðrum, tað eru nøkur undantøk frá tí regluni:

A: Tú kanst trumfa eina ella fleiri ferðir á tí stuttu trumfhondini

Tú skalt nú spæla 6♣ sum Suður. Vestur leypur á við ♥E og so ♥K:

N: ♠ 8	♥ B875	♦ E9843	♣ 982
S: ♠ E54	♥ 3	♦ K5	♣ EKDJ1076

♠ E, ♦ EK og sjey kleyvarastikk á hondini geva bara 10 stikk. Hvaðani skulu tvey aftrat koma frá?

Svar: Við at trumfa tveir spaðarar við borðinum, tí stuttu trumfhondini. Upp á tann mátan fært tú nýggju stikk burtur úr trumfunum. Skilir tú tað? Hvussu spælir tú hetta spælið?

Tekur tú beinanvegin trumfin, mást tú spæla trumf tvær ferðir fyri at fáa allar trumfirnar frá mótpartinum, og so er galið, tí tá er bara ein trumfur eftir á borðinum til at forsyrgja teimum báðum spaðataparunum á hondini.

Tú trumfar sjálvsagt tað næsta hjartaútspælið hjá vesturi. Halt fram við ♠E og spaðara til trumf á borðinum. Harnæst kleyvara til essið í hondini, og so aftur ein spaðara til trumf í Norðuri. Trumfa ein hjartara heima, og nú kanst tú taka restina av trumfunum frá mótpartinum fyri síðan at leggja kortini á borðið og biðja um restina.

B: Tú kanst krosstrumfa

Tú skalt spæla 4♥ sum Suður við ♣K í útspæli:

N: ♠ KJ7	♥KD1095	♦ -	♣B9764
S: ♠ 832	♥EB762	♦ KB982	♣ -

Leggur tú fyri við at taka trumf tvær ferðir (vanliga sita teir 2-1 hjá mótpartinum), er óvist, bæði hvussu nógv stikk tú kanst fáa, og hvussu nógv makkarin fer at rósa tær – tú skalt vera heppin fyri at vinna spælið.
Trumfa kleyvaraútspælið. Trumfa ein rútara á borðinum. Trumfa kleyvara, trumfa rútara o.s.fr. 10 stikk samanlagt. Upp á henda mátan fært tú stikk fyri allar tínar trumfir við at krosstrumfa.

Uppgávur

Legg spælføringina sum Suður til rættis í hesum trimum uppgávunum. Legg bara kortini upp á eitt borð, og royn at finna loysnirnar. Mótstøðan er ikki renonce nakrastaðni, og hevur heldur ongar singletons:

1. N: ♠ KD76	♥ 8	♦ EK98	♣ B942
S: ♠ EB1092	♥ ED763	♦ 75	♣ 8

- tú spælir 6♠, og E-V byrjar við at spæla kleyvara tvær ferðir; fyrst ess og síðani kong.

2. N: ♠ K	♥ D82	♦ KDB1092	♣ 984
S: ♠ E943	♥ EK765	♦ 875	♣ D

- tú spælir 4♥ og Eystur-Vestur leypa á við at spæla kleyvara tvær ferðir, sum seinast; fyrst ess, síðani kong.

3. N: ♠ E932	♥ 83	♦ KD7	♣ E983
S: ♠K84	♥ E92	♦ EB10983	♣ 2

- hóast 10 toppstikk eru í 3 ut, ert tú komin í 5♦ við ♣D í útspæli. Hvussu kemur tú nú á mál?

Kelda: "Bridgevejen 1" eftir Villy Dam.
Føroyskað hevur Randi Jacobsen
Alt tilfar, vit higartil hava havt, liggur sum pdf-fílur í A4 støddá heimasíðuni hjá Føroya Bridge Samband: www.bridge.fo

Hava tit hug at royna tykkum móti øðrum byrjarum, sum eisini hava fylgt við í hesum teig í vetur. Um so er, send ein teldupost til: helgi@dimma.fo.
Um nóg nógvir spælarar melda seg til, so skipar FBS fyri einum hugnaligum, avslappaðum tiltaki, eitt hóskandi stað í landinum, har tit kunnu royna at spæla móti hvørjum øðrum og fáa vegleiðing, um tit byrja at ivast í antin meldingum ella spælføring. Kortini verða givin soleiðis, at tit eiga at kunna raka røttu kontraktirnar við tí teorikunnleika, tit hava fingið um tvær vikur.

AT MINNAST

* Nýggjur litur frá svarara er krav
* 6 stig ella meir fyri at melda nýggjan lit á 1-stigi
* 10 stig ella meir fyri at melda nýggjan lit á 2-stigi uttan lop
* 16 stig ella meir fyri at leypa í nýggjum liti
* Taka trumf? Umhugsa fyrst at krosstrumfa ella at trumfa á tí stuttu trumfhondini

SVAR:

1. Tú skalt krosstrumfa, og ætlan tín er at fáa 9 trumfstikk umframt ♥E og ♦EK. Men áðrenn tú fert at krosstrumfa, er tað eitt gott hugskot at taka tíni stikk í síðuliðunum! Í hesum førinum altso ♦EK. Annars er vandi fyri, at ein mótspælari, sum skýtt ongan kleyvara ella hjartara hevur eftir, fær tveitt ein ella fleiri ruðtarar og seinni trumfa ein av tínum stóru ruðtarum.
Trumfa kleyvara aðru ferð, tak ♦EK og stikk aðru hvørja ferð hjartara og kleyvara við trumfi. Tað kennist væl at fáa stikk fyri allar sínar trumfir, ikki so? Ynsk tær sjálvum til lukku við teimum 12 stikkunum og vinnum lítlaslemmi!
2. Tað er ikki rætt at krosstrumfa her, tí tímm hjartastikk við 5-liðinum í hondini, ♣EK og tvær spaðaratrumfingar á borðinum geva bara 9 stikk. Tú skalt líva av ruðtaralitinum, men fyri at kunna gera tað mást tú taka trumf.
Stikk kleyvara aaðru ferð við trumfi. Set títt álit á, at teir tímm trumfirnir hjá mótpartinum sita javnt 3-2. ♥D, so EK, sum útrudda trumfirnar hjá mótpartinum. Harnæst sæitr tú í friði og náðum ruðtara. Tá ♦E er farið, eigur tú restina. 11 stikk. Hatta var ikki so torført, heldur tú?
3. Tú hevur tey somu toppstikkini í 5♦ ssum í 3 ut. Nr. 11 fært tú við eini hjartatrumfing í Norðuri, tí stuttu trumfhondini. Stikk við ♣E og hatt fram við ♥E og meira hjartara. Stikk á hondini, tá mótpartirin spælir aftur, og trumfa ein hjartara á borðinum. Úrslit: Tú missir eitt stikk í hjartara og eitt í spaðara.